




# Eldraøkið er mítt fremsta hjartamál



HEÐIN MORTENSEN
valevni Javnaðarfloksins
www.hedinmortensen.com

Av øllum málum er mítt fremsta hjartamál, at okkara eldru skulu fáa betri umstøður. Av royndum veit eg, at nógv restar í, og tí er tað upp á tíðina, at vit seta fokus á tey, sum hava bygt upp hetta samfelag, vit onnur bjóða okkum fram til at reka.

Vit, sum hava tørvin hjá okkara borgarum inn at okkum hvønn einasta dag, síggja og merkja, hvussu stórur tørvur er á eldraøkinum. Tørvur er á bæði ellisheimum, røktarheimum og røkt hjá teimum, sum búgva heima og kunnu búgva heima.

Tá tosað verður við eldri fólk, eru mong av teimum sera tolin og enntá takksom fyri tað, sum er gjørt. Men í veruleikanum eiga tey hvørki at vera tolin ella takksom, tí tað skuldi bara mangla, nú tað eru tey, sum gjøgnum eitt langt arbeiðslív hava bygt hetta samfelagið upp.

Ikki minst tey, sum eru knýtt at teimum eldru gjøgnum røkt og annað, síggja dagliga ovurstóra tørvin, ið má og skal nøktast nú. Tey eldru gera lítið burturúr at gera vart við seg, so tí liggur ein stór ábyrgd á øllum politikarum at taka teirra tørv í fullum álvara. Nú!

Veruleikin er, at støðan hjá teimum eldru nógvastaðni kring landið, og kanska serliga í Suðurstreymoy, er einki minni enn katastrofal! Hóast kommunan við millum annað Tjarnargarði hevur roynt at gjørt sítt, so eiga landsmyndugleikarnir at vera virknir viðspælarar, so røkkast kann á mál.

Umráðandi er, at vit fáa sett meira ferð á eldraøkinum, so tað ikki skal vera neyðugt at bíða eftir teimum loysnunum, ið eru neyðugar. Her krevst handling, og við eldraøkinum sum mínum fremsta hjartamáli vil eg gera mítt til, at trupulleikarnir á eldraøkinum verður loystir til fulnar – og tað skjótt eisini!

Eingin umbering er fyri, at so nógv hevur ligið og liggur á láni, tí hetta er bara ein spurningur um vilja og áræði til at fremja málini í verki. At eg eri til reiðar til tað, havi eg víst fyrr, og tað vil eg gera aftur!

# Sjúkrarøktarfrøðingar og Landssjúkrahúsið



JÁKUP PETERSEN
valevni hjá Tjóðveldinum
www.jakupp.fo

Ferð eftir ferð gera sjúkrarøktarfrøðingar vart við støðuna á Landssjúkrahúsinum. Men hvar eru læknarnir?

Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar fer í komandi viku á fund um arbeiðsumstøðurnar á Landssjúkrahúsinum. Hetta er hugaligur lesnaður.

Havi onkuntíð roynt at tikið málið upp í fjølmiðlum uttan stórvegis stuðul frá sjúkrahúslæknunum.

Vælsignaðir læknar, takið blaðið frá munninum og gevið okkum eitt boð uppá, hvussu vit ætla at fáa umstøðurnar betri á Landssjúkrahúsinum. Lat okkum halda uppat við at fjala okkum attan fyri leiðsluna. Vit noyðast út á vøllin og geva sjúkrasystrunum tann stuðul tær so ríkiliga hava uppiborið.

# Øll skulu spara upp til pensjón



EDMUND JOENSEN
Sambandsflokkurin

**Eingin hevur hug til, at livifóturin skal lækka, tá pensjónstilveran byrjar. Tí skulu allir føroyingar spara upp til sína egnu pensjón, og vit skulu byrja nú**

Hvussu fer tín tilvera sum pensjónistur at síggja út fíggjarliga?

Stóri spurningurin, fleiri seta sær, er, um livifóturin fer at lække, tá tíðin á arbeiðsmarknaðinum heldur uppat. Tey flestu fara sum kunnugt niður í inntøku, tá tey gerast pensjónistar, men fá munnu hava hug til, at livifóturin lækkar.

Hvat er til ráða at taka? Jú, lykilin til ein fíggjarliga tryggan og virðiligan aldurdóm liggur m.a. í einari pensjónsskipan, har hin einstaki sjálvur hevur høvuðsábyrgdina av at spara upp.

Í dag er fólkapensjónin – hóast hon er hækkað nakað – langt frá netto-lønarinntøkuni hjá teimum flestu. Samhaldsfasti er eitt ískoyti, men neyvan nóg mikið. Tí er neyðugt at spara upp sjálv/ur eisini, og vit eiga at byrja nú.

Framtíðarmyndin er, at vit í Føroyum verða fleiri eldri, meðan talið av arbeiðsaktivum fer at standa í stað. Tað merkir, at færri verða at gjalda fólkapensjónina til tey nógvu. Tað er ein onnur orsøk til, at hin einstaki eigur at hugsa um, at leggja til síðis til egna pensjón.

Í øðrum europeiskum londum er lógarkrav um, at hin einstaki skal spara upp til pensjón, t.d. eini 15 prosent av lønini. Hetta eiga vit eisini at krevja í Føroyum, og skattaskipanin skal framhaldandi geva teimum fyrimun, ið spara upp til pensjón sjálvi.

Tá tað er sagt, skal hitt almenna ikki blanda seg uppí, hvat slag av pensjón, hin einstaki velur, ella hvussu útgjaldið skal skipast. Heldur ikki skulu almennir myndugleikar hava nakra meining um, hvar uppsparingin stendur í uppsparingartíðarskeiðnum, og um hon t.d. verður sett í virðisbrøv. Tað er upp til hansara ella hennara, ið hevur spart upp og tí eigur peningin.

Tey, sum av sosialum orsøkum ikki hava nakran rímiligan møguleika at spara upp, skulu hjálpast í almennu skipanini, so eisini tey fáa ein virðiligan aldurdóm.

Hetta er sambandspolitikkur, og hann skal setast í verk eftir valið.

# Tí velja ung Miðflokkin



BILL JUSTINUSSEN
Miðflokkurin

Sambært veljarakanningum er stórur partur av veljarum Miðfloksins ung fólk. Tey ungu eru radikal eins og Miðflokkurin. Ung vilja hava greið svar og avgjørdar meiningar um stóru spurningarnar í politikki. Tey góðtaka ikki, at ein tosar í eystur og annar í vestur í sama flokki, tí tá er meiningin við at hava politiskar flokkar burtur. Aðalmálið við at hava ein politiskan FLOKK er júst, at har savnast fólk, sum hava somu politisku sjónarmið. Tað er óskiljandi, at fólk, sum eitt nú eru ímóti skrásettum parlagi kunnu flokkast saman við fólki, sum taka undir við skrásettum parlagi. Tí júst tað málið er ein stórur politiskur spurningur.

**Ungdómsumboðan**

Men Miðflokkurin hevur eisini ungdómspolitikk á skránni á øðrum økjum enn teimum etisku. Í hesum valskeiði hevur Miðflokkurin lagt fleiri ungdómspolitisk mál fram. Fyrsta málið snúði seg um at áleggja almennum myndugleikum at velja ungdómsumboð í almennar nevndir og ráð. Tey ungu síggja heimin úr tí nýggjasta sjónarhorninum, og tí eiga teirra sjónarmið at takast við í øllum hugsandi politiskum høpi. Hetta uppskotið fekk undirtøku, hóast tað varð nakað broytt.

**Ung og ferðsla**

Undirritaði legði uppskot fram um at hækka ferðmarkið á prutlum. Øll ung skilja hetta sjónarmið, men tíverri skiltu fleiri av eldri politikkarunum als ikki hetta málið. Tí er onki hent á hesum øki enn, og er tað bæði synd og skomm at síggja ungfólk liggja og "skríða" eftir vegnum, meðan tey alla tíðina verða yvirhálað av bilum. Sera órógvandi fyri øll í ferðsluni og helst orsøk til nógvar vandastøður og óhapp.

Eisini talaðu vit at, tá klippikortskipanin varð til viðgerðar í Løgtinginum. Eitt mega-stórt mistak í skipanini er, at ungir bilførarar verða harðari revsaðir enn teir meira royndu. Hvør man logiska frágreiðingin vera? Ein óroyndur bilførari er í nógv størri vanda fyri at koma til at gera eitthvørt mistak í ferðsluni, og tí eigur hann sjálvandi at fáa fleiri kjansir enn tey eldru at gerast ein royndur bilførari. Politiski myndugleikin er so fokuseraður upp á tey ungu, sum koyra ov skjótt og koyra ávirkað av rúsdrekka, at øll hini ungu, sum uppføra seg fyrimyndarliga í ferðsluni, skulu revsast kollektivt saman við fáu lógbrótarunum. Fyrr plagdi lærarin at hótta við at fleingja allar næmingarnar í flokkinum, um vit ikki avdúkaðu, hvør hevði brotið rútin, og soleiðis verður eisini hugsað um ung í ferðsluni.

Og so eru tað takksomu hagtølini, sum verða misnýtt yvir øll mørk. Sambært hagtølunum eru tað ungir dreingir í aldrinum 18-25 ár, sum eru við í flestu ferðsluóhappunum. So tí mugu politisku átøkini venda sær til hendan aldursbólkin. Men um eg nú spyrji, hvussu nógvar ferðir meira hesi ungu eru á vegnunum í mun til tey eldru, so fær ongin svarað. Tað finnast ikki hagtøl, sum snúgva seg um hetta. Løgið. Hetta er tann altavgerandi spurningurin. Tí um tann ungi bilførarin er 20 ferðir so nógv í bilinum, sum tann vaksni, og bara ger 10 ferðir so nógv óhapp, so er tað í veruleikanum tey vaksnu, sum ikki klára seg nóg væl í ferðsluni. Eg skilji væl, at tey ungu eru misnøgd við politikkararnar.

**Ungdómsting og vælrættur**

Eg eri sera fegin um, at ungdómsting varð skipað á fyrsta sinni fyri 2 árum síðani sum eitt ítøkiligt úrslit av okkara áheitan av Tingsins røðarapalli. Men hóast ungdómsting er eitt stig rætta vegin, so snýr tað seg tó bara um, at ung sleppa at "spæla" politikkarar. Og tað er ikki nóg gott. Nógv hava í ungum aldri gjørt sær sera skilagóðar meiningar um politisk mál, og tær meiningarnar eiga at koma til sín rætt. Tí skutu vit upp at lække valrættaraldurin niður í 16 ár. Vit vistu væl, at hetta málið ikki fór at vinna frama, men tað hugaliga var, at vit høvdu argumentini, meðan hini fingu rætt. Tann, sum hevur hug at hoyra orðaskiftið á Tingi, kann fara inn á heimasíðu Løgtingsins www.Logting.fo og kanna eftir..

**Ítróttarfólk og tónleikarar**

Miðflokkurin hevur ein framsóknan mentanarpolitikk. Ikki minst, tá tað snýr seg um ítróttarfólk og tónleikarar. Í løtuni liggur eitt uppskot á løgtingsskrivstovuni, sum snýr seg um at seta eina skipan við starvslønum í verk fyri ambitiøs ítróttarfólk og tónleikarar. Hvussu stolt eru vit ikki øll, tá vit hoyra um framúr úrslitini, sum ungu ítróttarfólkini og tónleikararnir fáa í millumtjóða kappingum. Tey eru okkara stoltleiki og vinna Føroyum stóra virðing úti í heimi. Miðflokkurin ynskir at flyta seg saman við ungdóminum og vil virka fyri, at tað almenna tekur lógvatak saman við hesum ungu fyri at lyfta tey enn longur fram á leið.

Alt hetta og nógv afturat ger, at ung velja Miðflokkin.

Bill Justinussen, eitt gott umboð fyri unga ættarliðið.